## Kinesarar yvirtaka Volvo

Eftir samráðingar í fleiri mánaðir hevur kinesiska bilverksmiðjan Geely skrivað undir keypsavtalu um Volvo. Kinesiski bilaframleiðarin Zhejiang Geely Holding hevur undirskrivað eina avtalu um at yvirtaka svensku Volvo persónbilarnar frá Ford. Hetta upplýsa kinesiskir fjølmiðlar sambært tíðindastovuna AFP. Tað var í desember í fjør, at Ford boðaði frá, at Geely í Kina høvdu boðið upp á Volvo, sum Ford hevði lýst til sølu. Síðan hava samráðingar verið millum partarnar, og endaliga avtalan er nú komin upp á pláss.




## Úlvar í New York

Tað er vorðið alt meiri vanligt at síggja villar úlvar í amerikanska statinum New York, og serfrøðingar siga, at fólk í sjálvum býnum New York kunnu fyrireika seg til at møta onkrum villum úlvi í býnum í heyst. Fyri nøkrum døgum síðani vóru boð eftir løgregluni, tí fólk høvdu sæð ein villan úlv á veg inn í býin. Tað eydnaðist serfrøðingum at fanga úlvin, sum bleiv fluttur burtur frá alfaravegi og sleptur leysur har. Myndugleikarnir siga, at úlvarnir eru farnir at nærkast býunum, tí teir flýggja undan veiðimonnum. Harafturat er minni føði enn fyrr.

# á landgrunninum

